gult cyan magenta svart



Sosialurin Nr. 19 - 27. januar 2001 Vikuskifti 23

# Giuseppe Verdi

## f. 9/10-1813 • d. 27/1-1901





*Í 1886 málaði Giovanni Boldini tónaskaldið Guiseppe Verdi (úr bókini Giuseppe Verdi, myten, mennesket og komponisten, eftir Francesco Cristofoli. Gyldendal 2000*

VERDI 100

*Ove Olsen*

Í dag, 27. januar eru 100 ár liðin, síðani stóra italska operatónaskaldið Giuseppe Verdi doyði í Milano. Nógvar av operum hansara hava heilt frá tá tær vóru framførdar fyrstu ferð hildið sær í altjóða repertoirinum meira javnt og áhaldandi enn hjá nøkrum øðrum operatónaskaldi uttan kanska Mozart og Wagner. Heilt frá byrjan av vísti Verdi ta mest neyðugu gávuna hjá einum operatónaskaldi – nevniliga evnini at skriva løg, sum lýsa kenslurnar hjá einum persóni í operuni og sum samstundis vekja kenslur í áhoyrarunum. Hetta var ein gáva, sum saman við áralongu royndum hansara at skriva dramatiskan tónleik til pallin, gjørdi Verdi føran fyri at skapa nøkur av teimum størstu meistaraverkunum innan italska opera, sum nakrantíð eru skapt.

### Italia og operan

Tá vit samanbera hugtøkini romantikkur og italsk opera, so vóru hesi hugtøk tey somu í fyrru helvt av 1800-talinum. Gjøgnum alla 19. øld er operan so nógv tann týdningarmesti tónleikaformurin í Italia, og operan verður so at siga málgagn fyri tað serliga slagið av romantikki í Italia. Nógvar orsøkur vóru til hetta. Til dømis skrivar italski rithøvundurin Benedetto Croce í 1908 soleiðis:

Romantikkurin í sínum psykologiska ella romantiska týdningi var ikki til í Italia í tí tíðarskeiðnum, sum verður rópt romantiskt. Hann var ikki til, og kundi ikki vera til. Ikki bert tí, at italiumenn tá høvdu aðrar trupulleikar at hugsa um – tjóðskaparligar, politiskar og sosialar – men tí at søguligu fortreytirnar fyri romantikkini vóru ikki til í Italia. Italia hevði ikki reformatiónina, mystisismuna, heimsspekina og myturnar, sum eyðkendu tann norðureuropeiska romantikkin. Okkara tjóðskaparliga støða forðaði fyri, at romantikkin blómaði sum aðrastaðni, skrivar Croce.

Hendan niðurstøðan er nær tengd at tí søguligu støðu, sum Italia var í í fyrru helvt av 1800-talinum. Frá gamlari tíð hevði Italia verið býtt sundur í ein hóp av smáum statum, sum høvdu ymiska politiska skipan. Har vóru fúrstadømi, kongaríki, kirkjustaturin, og ikki minst tey lýðveldi, sum vóru sprottin úr teimum gomlu bý-statunum. Italia var ikki ein politisk eind, og soleiðis var støðan eisini fyrst í 1800-talinum. Eftir fall Napoleons syrgdi Wiener-kongressin í 1815 fyri einum nýggjum maktbýti í Europa. Fyri Italia gjørdist avleiðingin tann sokallaða Restaurazione – ein endurstovnan av fleiri statslíknandi eindum sum til dømis kongaríkir, hertogadømir og stórhertogadømir, og so øðrum umráðum, ið vórðu roknaði sum landspartar av tí eysturríkska keisaradøminum. Umráði við hvør sínari søgu, traditiónum og trupulleikum. Og ígjøgnum alt tað romantiska tíðarskeiðið var Italia verandi í hesi støðu – býtt sundur í smáríkir – og soleiðis var tað, til landið varð savnað í eina tjóðskaparliga eind í 1860.

Men hóast hesa støðu, so hevði Italia kortini ein felags mentunnararv, sum flestu italiumenn kendu seg knýttar at. Fyrst og fremst italska málið, italska listin sum heild og í fyrru helvt av 1800-talinum eisini ein felags dreymur, sum gerst sterkari í kjalarvørrinum av »endurreisingini«: Dreymurin um eina italska tjóðskaparliga eind. Frælsishugsjónin, sum verður borin uppi bæði av tilvitanini um ein felags arv og av misnøgdini við tað útlendska okið, sum liggur á landinum. Og hetta bleiv endamálið hjá listini í tí italsku romantikkini – at uppala italiumenn til at kenna seg sum eitt fólk, at styrkja teirra frælsisdreym. Og tað listarliga amboðið til hetta kundi í Italia bert gerast operan. Fyri tað fyrsta tí at operan sum listargrein hevur sín uppruna í Italia, og opera er fyrst og fremst grundað á sang, ið er tann náttúrligasti tónleikaformurin av øllum. Og opera-traditiónin í Italia hevði verið í støðugari menning heilt síðani tað fyrsta operahúsið lat upp í 1637. Í fyrru helvt av 1800-talinum var soleiðis ein hópur av opera-húsum í Italia – heilt frá tí stásiliga La Scala í Milano til tey mest eyðmjúku opera-hús í meira fjarskotnum býum.

### Verdi sum tjóðskaparlig ímynd

Í 1830-unum vóru tað Bellini og Donizetti, sum vóru ráðandi á tí italska opera-pallinum, og eftir av Vincenzo Bellini doyði í 1835, bert 34 ára gamal, var Donizetti tann fremsti opera-komponisturin. Men tá Giuseppe Verdi byrjaði at skriva sínar operur seinast í 1830-unum fekk Italia av álvara tann opera-komponistin, sum kundi gerast málgagn hjá rørsluni fyri italskari endurreisn. Fyrstu tvær operurnar hjá honum høvdu ikki so stóran týdning í hesum sambandi, men í 1842 kom hann veruliga fram við stóru operuni Nabucco. Hon var eitt sera væleydnað verk, bæði musikalskt og politiskt. Her hoyrdu fólk ein nýggjan tóna, ið var aggressivur og ágangandi, eina sterka rútmu og háborin í melodiunum. Tað víðagitna trælakórið – va pensiero sull'ali dorate – sum lýsir longsulin hjá teimum jødisku fangunum eftir heimlandinumm og frælsinum, skiltu italienar alt fyri eitt. Tað var júst hesin tónin og hetta huglagið, ið bar teirra egna longsul eftir italskum frælsi undan tí eysturríkska okinum uppi.

Í teimum fyrstu operunum hjá Verdi er tað fólkið, sum er tann veruligi høvuðspersónurin, og tjóðskaparkenslan er tað veruliga evnið, og á henda hátt fingu operahúsini ein nýggjan, meira vandamiklan politiskan týdning. Tann eggjandi tónleikurin hjá Verdi østi tjóðskaparkensluna hjá áhoyrarunum. Verdi gjørdist ein ímynd – ja sjálvt hansara navn var ein ímynd. Fólk løgdu ein nýggjan týdning í bókstavirnar VERDI, og tey róptu Viva Verdi. Meiningin við hesum var: Viva Vittorio Emmanuele, Ré d'Italia – Livið Viktor Immanuel, kongur Italia. Viktor Immanuel var kongur í Piemonte við høvuðsstaði í Torino, og hann vildu nógv hava sum konga í einum sameindum Italia. Og sjálvt um handlingin gekk fyri seg fyri langari tíð síðani og í heilt øðrum londum, so skiltu fólk sambandið við teirra egnu støðu í teimum operum, sum komu beint aftaná Nabucco – I Lombardi frá 1843, Ernani frá 1844 og Attila frá 1846. Við operum sínum upp ígjøgnum 1840-ini gjørdist Verdi ein politisk ímynd og operur hansara hildu tjóðskaparrørsluni uppi.

Men samstundis menti hann hesi árini sín egna stíl, og hann fann skjótt sín heilt persónliga opera-stíl.





*Ove Olsen tónleikaleiðari, við trimum av verkum Verdi's í tónaleikasavni Útvarpsins*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Og operur hansara fóru meira og meira at snúgva seg um tað einstaka menniskja – teirra sinnalag, trupulleikar og innanhýsis viðurskifti. Macbeth frá 1847, Louisa Miller frá 1849 og Stiffelio frá 1850 eru allar tekin um ta gongdina. Ein gongd, sum í stóran mun hevði uppruna sín í livandi áhuga hansara fyri bæði italskum og útlendskum bókmentum. Shakespeare var sera væl umtóktur aftur í 1800-talinum – í romantikkini – og Verdi hevði alt sítt lív sera stóra virðing fyri Shakespeare. Tríggjar av operum hansara eru grundaðar á sjónleikir hjá Shakespeare: Macbeth, Othello og Falstaff.

Verdi leitaði altíð eftir áhugaverdum, sterkum og kenslubornum persónum, sum hann kundi brúka í sínum musikdramatisku verkum. Og í 1851 og 1853 komu tær tríggjar operurnar, sum fólk seinni hava kallað hansara romantisku trilogi – Rigoletto, Il Trovatore og La Traviata. Í veruleikanum er ikki talan um eina trilogi, tí evnini eru heilt ymisk, men tær verða kortini bólkaðar saman, tí tær í stíli eru líkar. Her er tað fyrsta stóra hæddarpunktið í langa lívsverkinum hjá Verdi. Søgurnar, sum operurnar eru grundaðar á, eru allar útlendskar – Rigoletto eftir Victor Hugo, Il trovatore eftir ein spanskan leik av Guttierez og La Traviata eftir Alexandre Dumas. Stór verk komu eisini seinni – tildømis La forza del destino í 1862, Don Carlos í 1867 og Aida í 1871. Í Føroyum hevur eisini hansara framúrskarandi Missa da Requiem frá 1873 verið framført.

### La Traviata

Sum nevnt aðrastaðni, so er ætlanin at operan La Traviata skal framførast í Føroyum í august mánaða í sambandi við nýggju listastevnuna, sum Norðurlandahúsið skipar fyri. Librettoina skrivaði F.H. Piave eftir skaldsøguni hjá Alexandre Dumas La dame aux camélias. Hetta er ein hugtakandi søga um eina vakra, fátæka unga gentu, sum kemur til Paris, har hon kemur inn í eitt lív í marglæti. Hon livir í veitslum við nógvum monnum kring seg. Men hon leggur alt hetta lívið aftanfyri seg tá ein ungur maður gerst góður við hana og hann verður hennara lívs kærleiki. Men seinni slítur hon sambandið millum tey, tí hon sær hvussu fortíð hennara er til bága fyri sosialu støðu hansara. Hon hvørvur út úr lívi hansara og doyr at enda av tuberklum.

Hetta er søgan í stuttum, og Verdi gjørdist alt fyri eitt hugtikin av henni og sá møguleikarnar fyri eini opera. Í dag verður La Traviata mett sum eitt meistaraverk við einum hópi av framúrskarandi melodium og tónleiki, sum ógvuliga væl lýsir teir ymsu persónarnar í verkinum. Men tá operan fyrstu ferð var framførd á Teatro Fenice í Venezia í 1853 var framførslan beinleiðis ein fiasko. Áhoyrararnir hildu tónleikin vera torføran, teir dugdu ikki rættuliga við at persónarnir vóru í samtíðar klæðum. Høvuðspersónurin – Violetta – var eisini framførd av eini heldur trivaligari sopran, og áhoyrararnir hildu tað vera eitt sindur láturligt, at hon skal doyggja av bróstsjúku. Men sum tey flestu meistaraverk, so yvirlivdi La Traviata hesar fyrstu trupulleikarnar og hevur alla tíðina verið millum best umtóktu operurnar hjá Verdi og hon hevur verið framførd á øllum heimsins stóru opera-pallum.

Giuseppe Verdi hevði eini framúrskarandi evni at síggja klárt, hvat kravdist av einum verki fyri at tað skuldi virka væl á einum palli. Alt sítt lív sýtti hann fyri at slaka í teimum krøvum, hann setti fyri verk síni. Hetta saman við hansara einastandandi gávum at skriva góðan, melodiøsan tónleik, sum altíð var grundaður á tað týdningarmesta í italskari opera – sangin – gjørdi, at Verdi framvegis hoyrir millum tey størstu operatónaskaldini, sum nakrantíð hava livað.


GRAN TEATRO LA FENICE

Per la sera di Domenica 6 Marzo 1853.

PRIMA RAPPRESENTAZIONE DELL'OPERA NUOVA

LA TRAVIATA

Libretto di F. M. PIAVE. - Musica del Maestro G. VERDI espressamente composta per questo Teatro

Dopo l'Opera avrà luogo il gran Ballo in cinque Atti composto e messo in Scena dal Coreografo sig. A. MONTICINI

LA LUCERNA MARAVIGLIOSA

Il prezzo del Biglietto d'Ingresso . . . Austr. L. 5. —

Pei Piccoli Fanciulli . . . „ 1 50

Si alza la Tela alle ore 8 precise.

*Uppslag frá frumsýningini av La Traviata í Venezia 6. mars 1853*